# Styrkur – ikki frelsari

**Við Toda aftur á liðnum, er einki at ivast í, at føroyska fótbóltslandsliðið hevur fingið eitt eyka álopsvápn. Tað er tó týdningarmikið, at hetta ikki verður einasta vápnið**

TODI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Flestum kunnugt, so boðaði Todi Jónsson frá, at hann nú aftur er til reiðar at tørna út fyri Føroyar, tá altjóða uppgávur standa á skránni. Eini boð, sum hjá teimum allar flestu má metast sum gleðiligt. Eisini hjá landsliðsvenjaranum, sum beinleiðis segði, at talan var um ein »kæmpegevinst« fyri landsliðið.

### Hóskar til stílin

Tað er heldur einki at ivast í, at ein leikari í tí flokkinum, sum Todi er í, eigur at vera ein styrkur hjá landsliðnum. Spurningurin tykist bara vera, hvussu vit fáa sum mest burturúr hesum.

Sjálvur nart Todi eisini við spurningin á tíðindafundinum. Hetta tá hann av fjølmiðlunum varð spurdur, hvørt tað ikki var vandi fyri, at landsliðið kanska í ov stóran mun fór at leggja spælið eftir honum.

– Tað kann sjálvandi gerast ein trupulleiki, og tað var eisini sjónligt onkran av teimum dystunum, sum eg leikti á liðnum. Tað komst kanska eisini av tí, at vit ofta vóru undir stórum trýsti, og so er tað kanska lættasta loysnin at sparka langt niðan, í vónini um at eg kann skapa okkurt, ella kanska sleppa at renna kapp við verjuna.

– Hinvegin, so haldi eg ikki, at tann vandin er eins stórur nú. Longu undir Allan Simonsen byrjaðu vit spakuliga at flyta spælið longur niðan á vøllin, og sjálvt um vit ofta vóru ov bangnir til hetta, so hevur tað gingið framá. Við broyttu spælskipanini haldi eg eisini, at vit hava nógv betri fortreytir fyri at spæla sum eitt lið. Mínar royndir siga mær í øllum førum, at



*Mínar royndir siga mær í øllum førum, at tað er munandi truplari at skora móti einum liði, sum spælir 4-4-2, sigur Todi, sum metir seg kunna fella væl inn aftur á føroyska fótbóltslandsliðið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

tað er munandi truplari at skora móti einum liði, sum spælir 4-4-2. Um liðið væl at merkja maktar at spæla hesa skipanina.

Og so helt Todi heldur ikki, at vit skuldu undirmeta hinar leikararnar á landsliðnum.

– Har eru jú leikarar, sum hava gjørt eitt gott arbeiði, fyri tað um eg ikki havi verið tøkur, og tað fara teir framhaldandi at gera. Og so haldi eg eisini, at spælistílurin hjá liðnum hóskar væl til mín. Eg veit, at eg havi ein skjótleika, sum ger, at eg kann bjóða mótstøðumonnunum av, og vónandi kunnu vit fáa gleði av hesum.

### Sosiali týdningurin

Tað er óneyðugt at siga, at meiningarnar um fráveruna hjá Toda hava verið nógvar hesi trý árini, sum hann ikki hevur verið tøkur. Nú hann aftur er til reiðar, sigur Todi, at hann í øllum førum er til reiðar at geva se fult út, fyri at gagna liðnum best.

– Eg eri í øllum førum motiveraður til at spæla á landsliðnum. Tað hevur altíð verið nakað serligt í mínari verð, og tí ynski eg bara at gera tað allarbesta. Eg haldi eisini sjálvur, at eg havi nógv at geva landsliðnum, og samstundis vóni eg, at eg kann vera við til at hjálpa teimum ungu leikarum, sum nú koma inn á liði.

Og sum skilst á tí, sum var at hoyra seinni um dagin, so er heldur eingin ivi um, at Todi er førur fyri at hjálpa til í so máta.

Millum annað segði Óli Johannesen í samrøðu við Rás2, at hann ikki var í iva um, at tað var ein stórur styrkur hjá landsliðnum, at Todi nú verður við aftur. Ikki minst legði hann dent á tær dygdirnar, sum FCK-leikarin hevur uttan fyri vøllin, og tað vildi so ikki líkst klaksvíkinginum, um hansara persónligheit var broytt nakað munandi hesi seinnu árini.

Tað verður so sjálvandi upp til fyrst og fremst Henrik Larsen at fáa tað besta fram í Toda. Ein síða, sum vit higartil hava sæð í flestum av teimum 43 dystunum, sum hann higartil hevur havt á liðnum, og sum nú tíbetur síggja út til at gerast munandi fleiri í tali.

## Sagt og skrivað um/av Toda

*»Er tað nakar leikari hjá okkum, sum mótstøðumenninir ræðast, so er tað Todi«*
Flemming Østergaard í samrøðu við Sosialin, apríl 2000

*»Tað kann ikki vera rætt, at Todi líkist einum, sum hevur verið í grindadrápi, hvørja ferð hann hevur verið á landsliðnum«*
Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri í FCK í mars 2001

*»Eg havi onga avgerð tikið um tað enn, men tað er klárt, at mann fer at hugsa eitt sindur, tá skaðarnir konstant raka so óheppið«*
Todi við Sosialin í mars 2001, tá tankarnir um eitt møguligt landsliðsavboð fyrstu ferð gjørdist almennir

*»Eingin ivi skal ver aum, at eg fegin vil spæla fyri Føroyar. Tað er nakað heilt serligt. Men á hinari síðuni eru tað skaðarnir og fótbóltsframtíðin«*
Todi, 21. mai 2001, tá hann skuldi taka støðu til landsliðsframtíðina

*»Eg havi havt sera ilt við at taka avgerðina. Hjartað hevur verið fyri at spæla við Føroyum, men skilið hevur sagt mær, at akkurát nú átti eg at givið avboð«*
Todi í Sosialinum 23. mai 2001, tá avboðið varð veruleiki

*»Tað er spell. Ikki bara fyri meg sum venjara, men serliga fyri føroyska landsliðið, sum missur sín kanska størsta profil«*
Allan Simonsen, táverandi landsliðsvenjari, eftir avboðið

*»Og sjálvt um tað í eygunum á summum sær út til, at landsliðið nú hevur mist allan brodd, so vita vit, at tað ikki er heilt rætt. Men tað verður ikki tað sama«*
Emil L. Jacobsen í Dimmalætting, tá avboðið var veruleiki

*»Todi er kalla ein fullkomin spælari. Hann hevur skjótleika og styrki sum fáur, og eg haldi meg kunna siga, at hann er so nógv tann besti leikarin, sum vit eiga. Tað er einki, sum kann steðga honum«*
Sibusiso Zuma eftir DM-gullið í 2001

*»Todi hevur verið fantastiskur fyri okkum í ár. Hann er ein veruliga stórur spælari, og hann er eisini eitt gott menniskja«*
Roy Hodgson eftir DM-gullið 2001

*»Tað er eingin loyna, at flogvitið í føroyskum fótbólti, Todi Jónsson, eigur eitt stórt pláss í mongum føroyskum fótbóltshjartað, og verða stórar vónir settar til framtíð hansara í altjóða fótbólti«*
Oddagrein í Sosialinum undan FCK-Lazio í august mánaði 2001

*»Og so skulu vit eisini hava Toda Jónsson aftur á landsliðið«*
Henrik Larsen, tá hann í mai 2002 varð settur sum landsliðsvenjari

*»Tað hevði verði synd, um Todi ongantíð kom við aftur á landsliðið, tí hann er ikki ungur longur, og eg haldi, at hann møguliga broytir støðu einaferð«*
Henrik Larsen á sama tíðindafundinum

*»Todi Jónsson er besti álopsleikarin í superliguni«*
Christian Andersen – eg eri besti venjarin í Danmark! – í august 2002

*»Eg havi skilt á lagnum, at okkurt hevur verið frammi um, at eg ikki eri áhugaður á at spæla á landsliðnum. Tað harmist eg um«*
Todi við Sosialin í september mánaði 2002

*»At venda okkara fræga spælara, Toda Jónsson, bakið og ynskja hann har piparið grør, tí hann ikki hevur vilja spælt fyri tjóðarlandið í seinastuni, er lítið uppbyggjandi. Hví ikki heldur lata farið vera farið og heldur hyggja frameftir«*
Oddagrein í Sosialinum, í juni mánaði 2003

*»Eg vóni, at øll tey, sum hava eina áskoðan um hetta, og sum vilja spyrja meg um hetta, nýta høvið til at gera hetta í morgin. Tá ið tíðindafundurin er liðugur, havi eg sagt síðsta orðið um, hví eg ikki havi verið á landsliðnum«*
Todi á heimasíðuni undan tíðindafundinum

*»Tað hevur nokk rørt meg eina ella aðrastaðni. Annars hevði eg ikki sitið soleiðis í dag«*
Ein sjónliga rørdur Todi um skrivingina, sum ikki altíð hevur verið eins tespilig

*»Eg má eisini siga, at eg onkra tíð hava verið glaður fyri, at eg ikki havi verið á landsliðnum hesi trý árini. Tí eg havi vita av, at eg ikki hava verið førur fyri at spæla fyri bæði Føroyar og FCK«*
Todi á tíðindafundinum

*»Eg hevði gjarna vilja spælt, men kroppurin vildi ikki«*
Todi á tíðindafundinum

*»Fyri meg hava tað verið trý sera hørð ár. Pá ein ella annan máta eri eg glaður fyri, at eg tók ta avgerð, sum eg tók, tí annars hevði eg kanska kortini verði noyddur at gevast – men eg eri eisini glaður um at vera við aftur«*
Todi við Útvarpið eftir tíðindafundin

*»Eg føli meg hava nógv at geva landsliðnum. Og eg vil eisini gjarna hjálpa teimum ungu leikarunum, sum nú eru á veg fram«*
Todi á tíðindafundinum

*»Væl afturkomin!«*
Suni Merkistein, tá hann endaði samrøðu við Toda í Útvarpinum hósdagin

*»Allir góðir leikarar eru sjálvandi vælkomnir á landsliðið, og Todi er ein klassaleikari. Hann verður ein risavinningur fyri okkum«*
Henrik Larsen við Útvarpið eftir boðini

*»Tað er deiligt fyri landsliðið og fyri landið, at Todi nú er við aftur«*
Henrik Larsen við Rás2

*»Eg eri sjálvandi glaður fyri, at ein spælari av hansara kalibur er tøkur aftur á landsliðnum«*
Óli Johannesen, liðskipari, við Rás2

*»Tað er eingin ivi um, at øll tey, sum halda við landsliðnum, hava saknað Toda«*
Regin Egholm, formaður í 12. manni, við Rás2

*»Mann kann ikki garantera nøkrum eitt pláss millum teir fyrstu ellivu. Men hann er sjálvandi eitt gott boð«*
Henrik Larsen við Rás2



B68-VB:

# Trygvi skal lofta B68

**Nýggi venjarin sigur fremstu uppgávu sína vera at binda fyri í verjupartinum, soleiðis at tryggleiki kann fáast aftur í spælið**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Í øllum førum fekk eg tað fatan, at teir ætla sær meira og betri enn tað, sum stigatalvn vísir, segði Trygvi Mortensen, eftir at hann hevði havt fyrstu venjingina við B68*

Tað varð í vikuni greitt, at tað verður Trygvi Mortensen, sum tekur við stýrisvølin hjá B68, eftir at Petur Mohr legði frá sær, og hann skal nú fyrireika seg til sína fyrstu uppgávu við liðnum.

Hóskvøldið stóð hann fyri fyrstu ferð fyri venjingini hjá B68, og tá vit seinnu skiftu orð við hann, tóktist lagið avgjørt ikki vera tað, sum annars ofta eyðkennir venjaran hjá einum liði, sum er statt í botninum.

– Eg haldi sjálvur, at stemningurin til venjingina í kvøld var góður. Og leikararnir tóktust heldur ikki vera so trýstir av støðuni, sum tú annars kundi hildið. Í øllum førum fekk eg tað fatan, at teir ætla sær meira og betri enn tað, sum stigatalvn vísir.

Og nýggi venjarin dylir ikki fyri, at tað nú ræður um at fáa stig.

– Enn er fjarstøðan til hini liðini ikki so stór, og fáa vit nakrar sigrar, so er skjótt at broyta støðuna. Men her og nú mugu vit fyrst og fremst royna at binda fyri í verjupartinum. Sjálvandi skal dysturin helst vinnast, men eftir eitt slíkt tap, sum liðið fekk seinast, má tryggleikin fáast aftur í spælið heldur altso Trygvi Mortensen, sum til sín fyrsta dyst hevur allar mans tøkar.

### Fleiri skaðar

Tað sama kann ikki sigast um Hans Nielsen, sum er venjari hjá VB.

Har hevur skaðastøðan í ár annars verið hampuliga góð, men seinstu tvær vikurnar hava verið alt annað enn góðar í so máta. Anders Sørensen noyddist út við skaða fyri tveimum vikum síðani, og enn er hann ikki tøkur hjá liðnum. Tað er Dalius heldur ikki, eftir at hann í vkuni fór undir skurð fyri bruna í álboganum, og Símun Samuelsen hevur eisini drigist við skaða, og tað verður ikki roknað við, at hann verður tøkur.

Eftir stigatalvuni at meta er tó einki at ivast í, at VB fer eftir øllum stigunum, og megna teir tað, er einki at ivast í, at fótbóltsfepurin í Vági av álvara fer at nærkast hæddunum aftur.

KÍ-Skála:

# Oddaliðið vitjar til stevnudyst

**Á Skála tykjast eyguni bara at venda uppeftir, og aftur sunnudagin fara teir eftir trimum stigum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í fjør var Hjalgrím Elttør stóri maðurin, tá KÍ vant burturúr botnliðnum av Skála. Sunnudagin er tó eingin Hjalgrím – og Skála er nú oddalið*

Tað kann neyvan sigast nóg oftani og nóg hart. Fótbóltsfepurin á Skála er fleiri stig oman fyri tað heilsuskaðiliga, og lítil ivi er um, at norðoyastevnugestirnir úr Eysturoynni verða heilt nógvir í tali sunnudagin.

Málið er framhaldandi at halda fast um oddasessin, men í mun til undanfarnu dystirnar, verður tað ikki heilt sama Skála-manningin, sum fer á vøllin.

Í øllum førum stendur vist, at Dusan Jaic ikki verður við, eftir at hann fekk sítt triðja gula kort móti B36. Hartil hava bæði Bárður Danielsen og Alexandur Johansen drigist við skaðar, og spurningurin er, hvørt teir verða tøkir sunnudagin.

### Broytingar í væntu

Hjá KÍ er Símun Joensen nú tøkur aftur, eftir at hann sat yvir við leikbanni seinast. Hinvegin verður Alexandar Djordjevic neyvan við tey bæði komandi umførini. Hann hevur fingið trupulleikar við rygginum, og sunnudagin er so ikki hugsingur um, at hann verður tøkur, verður sagt úr Klaksvík.

Og einki er at ivast, at klaksvíkingar heldur enn gjarna vilja sleppa at koppa oddaliðnum. Ikki minst eftir avrikið seinast, sum var alt annað enn sannførandi, og sum í øllum førum ikki gav nakrar ábendingar um, at KÍ vil vera við í toppinum, nú teir skulu halda sín 100 ára dag.

# Opnir dystir

Verður hugt á heimasíðuna hjá NordicBet, so stendur tað púra greitt, at talan er um eitt sera opið umfar í landskappingini. Størsti favoritturin er soleiðis VB, sum tó gevur pengarnar 1,7 ferðir aftur, um teir vinna útidystin á B68, meðan EB/Streymur gevur 1,8, um teir vinna á ÍF.

Í hinum trimum dystunum er talan um odds, sum liggja omanfyri tvey, og tað merkir, at til ber at vinna munandi upphæddir, um tú altso megnar at kollgita útfallið av dystunum.

Yvirlitið niðanfyri sýnir, hvørjum sannlíkindum tey á NordicBet hava roknað við til dystirnar um vikuskiftið.

**-jm**

| Dystur | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| EB/S-ÍF | 1,80 | 2,95 | 3,90 |
| GÍ-NSÍ | 2,05 | 3,70 | 2,55 |
| KÍ-Skála | 2,35 | 3,80 | 2,15 |
| B36-HB | 2,40 | 3,55 | 2,20 |
| B68-VB | 4,35 | 3,00 | 1,70 |

kelda: www.nordicbet.com

### Julian skal venja føroyingarnar

Føroyska útisetafelagið, ÍF Føroyar, hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at teir hava skift venjara.

Higartil í ár hevur tað verið danin, Bruno Simonsen, sum hevur tikið sær av hesum, men í samráð við nevndina í felagnum hevur Bruno gjørt av at steðga samstarvinum nú.

Ístaðin verður tað gamla landsliðskempan, Julian Hansen, sum fer at taka sær av føroyska útisetaliðnum.

Julian mundi vera fyrsti veruligi vongbakkurin í Føroyum, og upp ígjøgnum 80'ini var hann tríggjar ferðir við til at vinna FM við HB. Seinni var hann eisini fastur fúsur á landsliðnum, og hann var millum annað vil til fyrstu minniligu dystirnar, tá føroyska fótbóltslandsliðið tók lut í altjóða kapping.

Seinnu mongu árini hevur Julian verið búsitandi í Danmark, og hevur hann eisini roynt seg sum bæði leikara og venjara hjá føroysku útisetunum.

**-jm**

### Føroyar áttu besta liðið

Tað var ert í einari av teimum 21 kappingunum, at Føroyar ikki áttu fremsta svimjaran, tá millumtjóða kappingin við Orkney og Hetland var á skraðnni mikudagin.

Umframt hetta hugaliga úrslitið, so vórðu eisini tvey bólkamet sett í kappingini, og tað fær ikki verið annað enn hugaligt hjá landsliðsvenjaranum at staðfesta, hvussu stór framgongdin millum yngru svimjararnar tykist vera í løtuni.

Tað var Pauli Øssurson Mohr úr Fuglafirði, sum setti nýggju metini í bólki trý. Hann svam 50 metra bringusvimjing upp á 36,36 sekund, meðan tað tók honum 28,16 sekund at leggja sama teinin aftur um seg í frísvimjing.

**-jm**

### Albrechtsen til Onglands

30 mió kr. var tað, sum skuldi til, fyri at enska West Bromwich Albion fekk fingarnar í FCK-verjuleikaranum, Martin Albrechtsen.

Albrechtsen kom til FCK úr AB fyri tveimum árum síðani, og eftir tvey silvurmerki í fjør gjørdist tað sum kunnugt til tvey gullmerki í ár.

Sjávur sigur leikarin, at hann annars hevði glett seg til at spæla Champions League undankappingardystir við FCK, men at bretska tilboðið snøgt sagt var ov gott til at vraka.

West Bromwich tryggjaði sær fyri stuttum uppflyting til ensku Premier League.

Sambært BT roynir FCK nú ístaðin at ogna sær 23 ára gamla Dan Thomassen. Hann hevur seinnu árini roynt seg í Italia, har hann hevur leikt við Padova í seriu C, men sáttmálin har er nú liðugur.

Eisini hevur tað ljóðað seinastu dagarnar, at FCK roynir at fáa hendur á Jan Michaelsen, sum seinnu árini hevur leikt í grikskum fótbólti.

**-jm**